## Teldur

**HYGG HER!**
Nøkur spøl til Playstation til sølu.
*Tlf. 322567*

**KANN NAKAR**
selja mær »Resident Evil 3« til Playstation ella »Hitman 2« til Playstation II. Kanska eisini eitt Memory Card til Playstation II.
*Tlf. 212605*

**NINTENDO 64 YNSKIST TIL KEYPS**
og 2 joystick, Zelda-spæl og Super Mario Smash Brothers. Vit tosa um prísin.
*Daniel, 317364*

**TIL SØLU**
Pirates of Caribbean, American Conquest, Wolfenstein, Praetorians, Cossacks, Medieval/Shogun total war, Delta Force, Age of Empires, Commandos 2, + 10 spøl, nýggjur brennari 48x24x48. Alt fyri bert 1000 kr.
*Tlf. 515242*

**PLAYSTATIONSPØL TIL SØLU**
Ratt og spøl til Playstation bíliga til sølu.
*Tlf. 317364, Daniel*

**HYGG HER!**
Góð telda við ymiskum tilhoyri til sølu fyri 5.500,- Ring og fá meir at vita á
*tlf. 322567*

**TELDA TIL SØLU**
1.4 Ghz AMD Ge-Force ti4200, 128 Mb ram, grafikkort, 256 mb DDR-Ram, Canon printari og scannari og 2 17" skermar og spøl. Til sølu fyri 7.800 kr.
*Ring á tlf. 216226*

**XBOX SPØL**
Fifa Football 2003, 400 kr. NBA kurvabóltur 2003, 400 kr. Nýprísur pr. stk. uml. 600 kr.
*Tlf. 448106 - 508096*

## Tónleikur

**TRUMMUSETT TIL SØLU**
av merkinum Tama swingstar, 5 trummur. Paiste soundformule hi-hat, crash, splash og ride. Tama trummustólur, liturin er svartur, sum nýtt.
*Tlf. 262522*

**ELEKTR. KEYBOARD**
Yamaha PSR-GX76. Prísin tosa vit um.
*Tlf. 313975*

**KEYBOARD**
Casio CTK-541 lítið brúkt til sølu.
*Tlf. 317593*

**DJ PACKAGE TIL SØLU**
2X turntables, 1 scratch mixari +oyrafonir, nálir og káplar. Bert 1000 kr.
*Ring ella sms´a til 507102, Pætur - switch*

**KEYBOARD**
Gamalt Yamaha Keyboard PSR50 við innbygdum hátalarum, rytmuboks, midistik o.a. selist fyri 600 kr.
*Ring 517376 ella 317376*

**TAMA SWINGSTAR**
trummusett til sølu, 5 trummur. Paiste soundformula hi-hat, crash, splash, ride. Litur svart, sum nýtt, Tama trummustólur.
*Tlf. 443131-262522*

## Út- & Sjónvarp

**TIL SØLU**
Eitt sera gott Philips 720 radio frá 1973, er sum nýtt. Ring
*Tlf. 519613*

## Ymiskt

**NMT 450**
Ein lítið brúkt NMT 450 telefon Nokia 550 við løðara til sølu fyri 1500,-
*Tlf. 353000*

**DIGITALT MYNDATÓL 5.2 MP**
Eitt 4 mðr. digitalt Olympus E20p myndatól við speglreflex, 5,2 megapixel. Við í keypinum eru 2 sett av battarium + ladari, fjarstýring, 2 linsur 28 mm-200 mm zoom, 64 MB kort og taska. Nýprísur: 20.000 til sølu fyri 12.000,-
*Tlf. 210202*

**FILMAR TIL SØLU**
160 kr. stk. Um tú vilt vita meir, so ring
*tlf. 507603*

**PFAFF SEYMIMASKINA**
til sølu. Áhugað kunnu ringja á
*tlf. 224026/322248*

**NÝGGJ MAHOGNY ÚTHURÐ**
við bogaðum rúti til sølu vegna feilkeyp fyri 6.500 kr.
*Tlf. 316249*

**RÓGVIMASKINA**
til sølu fyri 300,- fungerar.
*Tlf. 210560*

**TIL SØLU**
1 sett av rulluskoytum nr. 37.
*Tlf. 257941*

**TIL SØLU**
1 frystidiskur við glasloki við kurvum til ísar, 1 frystidiskur, bogað glaslok við kurvum, 2 bommstativ, 1 pylsukókari.
*Tlf. 257941*

**FARTELEFON TIL SØLU**
Ein Sony Ericsson T610 v/ litskermi (65000 litir) og digitalt myndatól. Hevur bluetooth 32 polyfoniskar ringitónar, modem, og m.a. Battaríið heldur í eina viku. 1 1/2 mðr. gomul, selist bíliga.
*Tlf. 224311*

**GRUNDSTYKKI Í SØRVÁGI**
1370 fermetra grundstykki við sera góðum útsýni í Húsadali í Sørvági til sølu. Stykkið kann deilast í tvær byggigrundir.
*Tlf. 332614/225090*

**NOKIA 3650 TIL SØLU**
fyri 2.700 kr. Nýprísur 3.995 kr. Hevur digitalt kamera, Real One Player o.m.a.
*Tlf. 250537 best eftir kl. 18*

**YNSKIST**
Spoli til teir gomlu bandavspælararnar ynskist og ein hátalari við teim gomlu stikkunum.
*Tlf. 213199*

**NOKIA 8310 TIL SØLU**
fyri 2.000 kr. Nýprísur 4.360 kr. Hevur útvarp o.a. Cover og ein taska fylgir við.
*Tlf. 224023 best eftir kl. 17*

**PENSIONISTAFELAGIÐ HØFT**
á Tvøroyri hevur køkutombola fríggjadagin 24. oktober í Keypssamtøkuni. Limafundur verður aftur 5. nov. í Øravík.
*Nevndin*

**BYRSA TIL SØLU**
Russisk Dublett yvir/undir við tveimum avtrekkjarum, uml. 2 ár, einans nýtt fáar ferðir, til sølu fyri 3.500 kr.
*Tlf. 263662*

**ÓBRÚKT ÚTHURÐ**
Swedoor við rúti, høgra út, til sølu.
*Tlf. 252677*

**NÝTT ALUMINIUM TAK**
0,7 mm til sølu. 5 stk. á 5,47 m. og 20 stk. á 1,17 m. uml. 70 kvadratmetrar.
*Tlf. 211909*

**MODELSKIP TIL SØLU**
Eitt modelskip AWI 33 onki brúktur, til sølu
*.Tlf. 223267/257709*

**MÁLNINGUR TIL SØLU**
Um hóskandi boð fæst, selist málningur av H. J. Glerfoss, stødd 100 x 80 cm.
*Tlf. 514167*

**KÚLUPENNAR**
50 ymiskir reklamu kúlupennar, flestir úr Danmark og uttan fyri Føroyar, til sølu fyri 200 kr. + frakt.
*Tlf. 004586428627 - 004526747474*

**HARMONIKUHURÐ**
ynskist til keyps. Stødd uml. 1,95x0,8 m.
*Tlf. 310751 - 257940*





# »Nógv at síggja og nógv at vinna« í sjónleikarhúsinum í Havn

UMMÆLI
*Símun Johannesen*

Í sjónleikarhúsinum verður »Álvaleikur« eftir H.A. Djurhuus í løtuni framførdur. Tað hevur altíð verið mær ein stór gleði at verið til sjónleik. Tað gevur eina størri kenslu av undirhaldi, tá leikararnir eru av kjøti og blóði. Teir standa sjáldan meira enn fáar metrar frá tær, mótvegis leikarunum í tí sterila biosalinum. Í biosalinum tosa leikararnir flest allir enskt ella annað útlendskt tungumál, og hava ikki møguleika fyri at gera nakran sjarmerandi smáfeil, sum kann bjargast við improvisatión, tí filmsleikararnir eru komnir í fastan ævigan sjónvarpsform, sum ikki kann broytast.

Álvaleikur er eftir mínum tykki ein væleydnaður leikur. Tað er sera hugnaligt at sita í forhøllini áðrenn dyrnar lata upp, so byrjar ein ungur maður knappliga at spæla á klaverið, sum stendur har. Eftir klavertónarnar í forhøllini bjóða Blíðir klavertónar tær innar í álvaholuna. Pallurin fyri fyrsta part tykist mær at vera serstakliga væl eydnaður. Tað er ein sonn frægd at sita har í káma ljósinum áðrenn leikurin byrjar og stara at einum palli, ið minnir um eitt listaverk meðan klavertónar spæla. Tað er eitt sindur hugaligari enn at sita í myrkri og hyggja at einum tjaldi, sum vanliga hongur fyri pallin áðrenn leikur skal fara fram.

Søgan í leikinum, sum inniheldur bæði gaman og álvara, nertur við nøkur av teimum endaleysu temaum upp gjøgnum tíðirnar. Kærleikin millum Sigmund og Ingu er ikki nakað nýtt tema. Happingin/kúganin av Maluni er heldur ikki nakað nýtt.

Leikurin hevur, sum heitið gevur ábending um, funnið íblástur úr gandheiminum. Álvarnir ganda Sigmund og Sjúrð, sum villast í mjørkanum. Sjúrður verður gandaður, so hann gerst forelskaður í Maluni, sum er ein 55 ára gomul genta. Sigmund fær gull og aðrar dýrgripir frá álvunum, sum síðan geva honum dirvi til at biðja um gentuna, hann er góður við. Aðrir, sum fella undir gandinum eru løgtingsmenninir, sum missa málið og byrja at gala sum hanar, ístaðin fyri at práta.

Í hesum leiki, har álvarnir ganda menniskjuni fyri at undirhalda sær sjálvum, er møguleiki fyri at frøast um kærleikan millum Sigmund og Ingu. Somuleiðis er møguleiki fyri at taka synd í Maluni, sum verður illa viðfarin av fólkinum í bygdini. Eisini er møguleiki at flenna at neyðar Sjúrði og løgtingsmonnum, sum eru gandaðir av álvunum. Alt í alt er »Álvaleikur« ein væl eydnaður leikur, og vil eg mæla fólki til at hyggja at honum.

*Álvaleikur*

*Hómi kámt pallin*
*Ljósini tendrast*
*Listarverkið vaknar*
*fær lív*
*og fer til gongu*

*gandur lagar lív fyri*
*kærleikanum*
*ið fanst áðrenn*
*eins og vónin*

*gandur ger kærleika*
*sum ikki eigur framtíð*

*siti í hesum heimi og hyggi*
*at teimum*
*ið siga seg eiga sannleikan*
*gala sum hanar*







## HEILSANIR



Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum á ymiskan hátt gjørdu hjúnabandsdag okkara tann 6. sept. ógloymandi.
**Sigga og Thorvald**



**Góði Hákun**
Hjartaliga tillukku við føðingardegnum. Muss og klemm
**Mostir**



**Góði elskaði Hákun**
Hjartaliga tillukku við 3 ára føðingardegnum tann 20. okt.
**Ynskja omma og abbi**



**Góða dóttir og stórasystir**
Vit ynskja tær hjartaliga tillukku við 7 ára degnum. Alt tað besta í framtíðini. Nú mást tú vera so røsk í skúlanum.
**Heilsan mamma, babba og Allan**



**Góða fitta Linda**
Vit ynskja tær hjartaliga tillukku við 7 ára degnum 4. okt. Jesus pápi signi framtíð tína.
**Heilsan omma, abbi og mostir**



**Góða stórasystir**
Hjartaliga tillukku á 14 ára føðingardegnum 19. okt.
**Ynskir Poul**



**Góða lítlasystir**
Hjartaliga tillukku við 5 ára føðingardegnum tann 21. okt.
**Ynskir Poul**

Skjótt rennur tíðin. Í dag 21. okt. fyllir hendan fitta gentan á myndini fimmti ár. Góða lítlasystir, hjartaliga tillukku.
**Ynskja vit øll**



**Góði fitti Hákun**
Hjartaliga tillukku á 3 ára degnum.
**Ynskja langomma og langabbi**



**Góða Sólgerð og Erika**
Hjartaliga tillukku við 14 og 5 ára døgunum tann 19. og 21. okt. Alt gott í framtíðini.
**Mamma og babba**





Her eru tit deiligir. Góði Heðin. Hjartaliga til lukku við 1 ára degnum.
**Mamma, babba og stóribeiggi, Martin, elska teg ordiliga nógv**



**Góði Johnabbon**
Tillukku við 70 ára degnum 14. okt. Stuttligt at vera heima at vita ommuna og tje. Vónandi síggjast vit á jólum.
**Niklas, Markus og Natasja**


**Heilsanir** 30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

### Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á mið-degi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑Leygard.

Tekstur:..........................................................................
..................................................................................
..................................................................................
..................................................................................
..................................................................................
..................................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: ...........................................................................
Bústaður: ......................................................................
Bygd/býur: ...................................... Tlf.: ..................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Sosialurin
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »Heilsanir«